Tala P. M. Dams á tingi 1. august 1950.

# Uppsøgnin til landsstýrið.

(Brot)

Harnæst undirskrivaðu flokkarnir við A. Samuelsen, lögmanni, Johan Poulsen lögtingsmanni, fyri sambandsflokkin, Louis Zachariasen, landsstýrismanni, fyri sjálvstýrið og mær fyri javnaðarflokkin ein arbeiðssáttmála við 15 punktum og sum byrjaði soleiðis:

»Undirskrivaðu Sambandsflokkur, Føroya javnaðarflokkur og Sjálvstýrisflokkur eru vorðnir samdir um at seta landsstýrið við A. Samuelsen, lögtingsmanni, sum lögmanni, og at vit í fyrstu syftu binda okkum til sum minsta mál at arbeiða fyri...«

Hesi 15 punktini viðvíktu:

1) Gera ta sociala forsorgina í Föroyum ein góða og í Danmörk.

2) Fremja ta mikið umröddu heildarætlan fyri sjúkrahúsbygging í Föroyum.

3) Statsstuðning og bílig og langfreistað lán til havnabygging í Föroyum.

4) Skipa fyri at húsabyggingin í Föroyum verður eins væl fíggjað og lætt at fáa í lag sum í Danmørk.

5) Langfreistað og bílig statslán til ravmagnan av Føroyum.

6) Státsstuðning og bílig statslán til bygging av kostskúla og studentaskúla við umskipan av okkara hægri skúlaskapi.

7) Inn og útflútning sum sermál.

8) Skipan av valutaviðurskiftunog sterlingbólkaspurninginum.

9) Skjóta loysing av telefon- og flúgvisambandinum við útheimin.

10) Keyp av Landmandsbankens partapeningi í Føroya Banka og broytan av bankaskipanini.

11) Industrialiseran av fiskivinnuni og styrkjan av øllum föroyskum ídnaði.

12) Arbeiða fyri at fáa tey størst möguligu rættindi í Grønlandi, harundir útbyggjan av havnaviðurskifitum, skipasmiðju, oljutangum o. t.

13) Gjögnumsföran av plánunum um Suðurhavshvalaveiðu við byrjan í Föroyum og mögliga eisini í Grönlandi.

14) Oljubryggjan í Sóldafirði verður at byggja sum samtykt av tinginum, og spurningurin um einkar flytan av olju verður skjótast gjörligt nærri at seta í verk (orðrætt úr sáttmálanum.)

15) Nýggja og betri lönskipan fyri fólkaskúlalærarnar í Föroyum.